# TÍÐINDI

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
tlf 341800

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður:

## Gjald fyri vald

**- Einasta bindingin millum Føroyar og Danmark í dag, er gjald fyri vald, sigur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum gevur politikarunum í Fólkaflokkinum ábyrgdina av, at Føroyar enn ikki eru skipaðar sum fullveldi**

FÓLKAATKVØÐAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Fólkaatkvøðan í 1946, sum enn ikki er framd í verki, hevur bara áhuga hjá frælslyntum føroyingum.

Tað ásannar Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum verður millum røðararnar á tiltakinum á Eiði í annaðkvøld.

- Fólkaviljin, sum kom til sjóndar í føroyska fólkinum í 1946, bleiv torpederaður við donskum valdi – og av teimum føroyingum, sum taptu fólkaatkvøðuna. So leingi, sum hesin vilji ikki er framdur í verki, halda vit tað vera rætt at varpa ljós á dagin.

Tórbjørn ásannar, at tað upp ígjøgnum tíðirnar hevur gingið spakuliga rætta vegin.

- Við teirri politisku samanseting, vit hava á tingi, hevur tað verið ein tungur burður at víst fólkinum á vitan – og ljósið - fyri framman.

Hann heldur, at tað onkusvegna er líkt til, at løgtingið ikki umboðar tey viðurskifti, sum tingið er valt eftir.

- Eg hugsi serliga um fólkafloksumboðini á tingi, sum aftur og aftur hava svikið sínar frælslyntu veljarar.

Tórbjørn vísir á, at Fólkaflokkurin í síni tíð var aktivur í strembanini eftir at fremja fólksins vilja frá 1946 í verki, men her er alt farið fyri bakka – ikki minst við sitandi samgongu, nú Fólkaflokkurin er í landsins leiðslu saman við tveimum sambandsflokkum.

- Tjóðveldisflokkurin, sum beinleiðis er ein avleiðing av svikinum móti føroyska fólkinum í 1946, stendur rættiliga einsamallur.

Løgtingsmaðurin heldur, at hevði málið, sum Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin settu sær síðsti í nítiárunum, verið fasthildið, høvdu Føroyar verið eitt fullveldi í dag.

- Men her sveik Fólkaflokkurin aftur, tá ið danir settu fram sínar hóttanir um stutta skiftistíð.

Tórbjørn Jacobsen er sannførdur um, at politikararnir í Fólkaflokkinum als ikki vilja, at Føroyar skulu skipast sum fullveldi.

- Eftir valið, har valevni floksins høvdu verið stórorðað um fullveldi, vóru teir komnir í ein "stima", eftir at teir høvdu givið sínum veljarum gylt lyftir. Haraftrat varð Fólkaflokkurin tvingaður av Tjóðveldisflokkinum at taka undir við íslendsku loysnini frá 1918 um fullveldi.

Løgtingsmaðurin er sannførdur um, at Fólkaflokkurin hevur alla ábyrgdina av, at føroyingar ikki náddu undir land við fullveldinum.

- Í dag rekur Fólkaflokkurin reinan heimastýrispolitikk.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at málið um politisku viðurskiftini millum Føroyar og Danmark í dag bert snúgva seg um eina spurning.

- Spurningurin er gjald fyri vald, sigur hann avgjørdur.



*- Fólkaflokkurin hevur ábyrgdina av, at Føroyar ikki eru fullveldi í dag, sigur Tórbjørn Jacobsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*




TAK ALLA FAMILJUNA VIÐ TIL DANLAND

Pakkið bilin heima í túninum, koyrið umborð og hugnið tykkum á ferðini. Soleiðis koma tit frísk og vælúthvild til dyrnar á Danland í Hirtshals – bert fáar kilometrar frá Hanstholm, har Norröna leggur at. Lættari gerst tað ikki. Danland hevur alt, sum krevst fyri at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman.

2 vaksin, 2 børn og 1 bilur í 1 viku í Danland úr bert

7.024,-

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4 koyggjukamari við wc/bað innv. Hartil uppihald í 2 verilsis íbúð á Danland í Hirtshals. **Eykakostnaður:** Oljuavgjald kr. 200,- fyri hvønn ferðandi og avgreiðslugjald kr. 120,- fyri bíleggingina. Tilboðið er galdandi í tíðarskeiðnum 21.09–19.10.2006. Tilboðið er treytað av at pláss er umborð á Norrönu og á Danland í nevnda tíðarskeiðið.

SMYRIL LINE
J. BRONCKS GØTA 37 · P.O. BOX 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 34 59 00 · FAX 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO

SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

NOREG · ÍSLAND
HETLAND · DANMARK
CRUISE

WWW.SMYRIL-LINE.COM
TLF 34 59 00

14. september:

## Fyrilestur, røður, tónleikur og sangur



**Í morgin, 14. september, skipa Eysturoyar Tjóðveldisfelag og Norðstreymoyar Tjóðveldisfelag fyri almennum tiltaki á Eiði, nú seksti ár eru liðin síðan fólkaatkvøðuna**

FÓLKAATKVØÐAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á fólkaatkvøðuni, 14. september 1946, høvdu føroyingar høvi at atkvøða um framtíðar støðu Føroya. Valið stóð ímillum danskt stjórnaruppskot øðrumegin og loysing millum Føroyar og Danmark hinumegin.

Úrslitið gjørdist ein tepur meiriluti fyri loysing.

- Enn er hesin seksi ára gamli vilji ikki framdur í verki, og so leingi Føroyar framvegis eru eitt danskt hjáland, verður dagurin markeraður og hildin, siga tjóðveldisfeløgini.

Á fundinum á Eiði, sum er almennur, fer Annfinnur í Skála, søgufrøðingur, at halda fyrilestur. Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður og Olaf í Garði Joensen, varamaður hansara í Eysturoy, fara eisini at røða.

Kvívíkingurin, Leivur Grækarisson, fer eisini at siga frá minnum og upplivingum frá hesi hendingaríku tíð í Føroya søgu.

- Fólkaatkvøðan var fyri allar føroyingar, og soleiðis verður eisini við tiltakinum í annaðkvøld. Eftir umbøn er tingmaður Sambandsfloksins í Eysturoy og løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, eisini boðin við, siga tjóðveldisfeløgini.

Edmund Joensen fer at hugleiða um hesi seksti árini og um, hvussu hann heldur, at føroyska samfelagið politiskt skal skipast frameftir.

Umframt røður og hugleiðingar, fer gjáarmaðurin, Jónsvein Olsen, sum býr í Rytuvík, eisini at undirhalda við sangi.

Á skránni fyri tiltakið á Eiði verður eisini felagssangur.